# VENJINGARSKÚLIN

handan Á 14 · Box 59 · FO-110 Tórshavn

## Søkt verður eftir 4 lærarum

- 1 lærara í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2008/09 fyri lærara í farloyvi
- 2 lærarum í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2008/09 fyri lærarar við niðursettari tíð
- 1 lærara í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2008/09 at lesa avlopstímar (endaliga tímatalið verður ikki greitt fyrr enn 1. september 2008).

Skúlin hevur brúk fyri fólki, sum kunnu undirvísa í

ítrótti, støddfrøði, alis/evnafrøði, handaligum lærugreinum, tónleiki, fremmandamáli, landalæru, lívfrøði, náttúru/tøkni

– og sum hava læraraútbúgving, hava góð samstarvsevni, eru opin, kreativ, vilja vera við til at menna skúlan, kunnu átaka sær starvið sum flokslærari, og sum eru sinnað at arbeiða í toymi!

Størvini eru lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4

Meira fæst at vita um størvini við at seta seg í samband við skúlastjóran, Petur Ova Petersen á tlf. 302570 ella 213502.

Umsókn saman við CV, prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlanum **í hendi í seinasta lagi 20. juni á middegi.**

Í Venjingarskúlanum verða komandi skúlaár umleið 440 næmingar í 19 flokkum, og her koma at starvast 45 fólk. Lærararnir eru skipaðir í 5 sjálvstýrandi toymi : 1.-3. fl., 4. og 5. fl., 6. og 7. fl., 8.-10. fl. og sertoymi. Skúlin húsast í trimum bygningum : 1. og 2. flokkur halda til á Ytra skúla við Landavegin, 3. fl. á Heimara skúla við Fr. Petersens gøtu og 4.-10. fl. eru í skúlanum á Stórheyggi.

---

BILIMPORT.fo







## NISSAN TITAN TIL SØLU

Árgangur: **2006**
Km: **35.800**
Motorur: **5,6 cc - V8 - 305 hk**

VÆL HILDIN

Kostnaður kr.
**220.000,-**

Áhugaði ringi:
**213636**

---

# Starvsfólk til umhvørvisplássið

**Søkt verður eftir umsjónarfólki til umhvørvisplássið hjá Sunda kommunu at byrja 1. juli 2008, ella eftir nærri avtalu. Umhvørvisplássið er í Nesvík.**

Talan er um nýtt fulltíðarstarv og er arbeiðstíðin frá týsdegi til og við leygardag.

Høvuðsuppgávan verður at taka tær av umhvørvisplássinum ta tíð, tað er opið. Harafturat verður burturkast savnað frá stovnum í kommununi, umframt at umsjónarfólkið hevur eyguni við umhvørvisviðurskiftum í kommununi sum heild. Neyðugt er, at viðkomandi hevur koyrikort.

**Vit ynskja, at tú:**
- er røkin og hevur ein livandi áhuga fyri umhvørvinum
- dugir at samstarva og ert fyrikomandi
- kanst arbeiða sjálvstøðugt
- hevur eyga fyri, hvat fyriferst rundan um teg.

**Setunarviðurskifti:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum avvarandi yrkisfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran á teknisku deild, Jógvan Waagstein, tlf. 471027 ella 771027.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 18.06.2008 og skulu sendast til:

**Sunda kommuna**
Oyrarbakkavegur 3
Postboks 10
400 Oyrarbakki

**Sunda kommuna** fevnir um bygdirnar Hósvík, Hvalvík, Streymnes, Saksun, Langasand, Haldórsvík, Tjørnuvík, Oyri, Oyrarbakka, Norðskála og Gjógv. Har búgva tilsamans uml. 1600 fólk sum kommunan strembar eftir at veita munadyggar tænastur á øllum økjum.

---




# Lastbilførari

Avloysari søkist frá 19/6 – 4/7.

Stóra koyrikortið krevst.

**Áhugaði ringið á tlf. 50 51 92**

---

# EIÐIS SKÚLI

Kolsvegur 8 · Postrúm 29 · FO-470 Eiði
Heimasíða: www.eidisskuli.fo

## Søkt verður eftir lærarum og stuðulsfólki til Eiðis skúla

- 1 lærara í fast starv frá 1. august 2008. Tann, ið settur verður, kemur at verða nógv knýttur at 1. flokki m.a. sum flokslærari.
- 1 tíðaravmarkað starv skúlaárið 2008/2009 vegna avlopstímar og serligan tørv. Starvið er uml. 12 tímar um vikuna. Endaliga tímatalið verður ásett 1. september.
- 1 hjálparfólki við pedagogiskari ábyrgd 20 tímar um vikuna. Arbeiðið er í høvuðsheitinum at virka sum stuðul hjá einum næmingi við autismu.
- 1 hjálparfólki við pedagogiskari ábyrgd 20 tímar um vikuna. Uppgávan er at virka sum stuðul hjá næmingum við serligum tørvi.

**Tey, ið sett verða skulu:**
- virka eftir endamáli skúlans, ið er *trivnaður, ábyrgd og læra*
- undir ábyrgd leiðslunnar taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva
- verða fús at taka á seg tær uppgávur, ið eru í skúlanum
- vera við til áhaldandi at menna skúlan

**Førleikakrøv til lærarastørvini:**
Læraraútbúgving

Lærarastørvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 - 27.4.

Stuðulsstørvini verða lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Meira kann fáast at vita um størvini frá fyrstalæraranum Tom Joensen á tel. 42 35 79 ella 22 90 45.

Umsóknir við c.v. og avritum av prógvum skulu vera fyrstalæraranum í hendi í seinasta lagi mikudagin 18. juni kl. 15.00.

EIÐIS SKÚLI
POSTRÚM 29
470 EIÐI

Eiðis skúli hevur undirvísing í 1. – 7. árgangi. Skúlin er væl útgjørdur. Lærarar skúlans hava arbeiðsteldu og umstøður at fyrireika seg. Komandi skúlaár verða 9 lærarar 2 stuðlar og 79 næmingar í Eiðis skúla.

---

Sosialurin Sosialurin
i
Sosialurin Sosialurin